ALMENN SJAVSKAPPING
verður í Menningarfelagshølunum við Gøtugjógv, sunnudagin 25. apríl kl. 15. Steyp verða latin. Tilmelding oneyðug.
Gøtu Menningarfelag

Súkklur

PUCH MONZA
Hevur tu deilir til Puch Monza so kunnu vit byta um ella selja.
Tlf. 316668

TIL SØLU
Apprilia RS skrásett sum motorsúkkla, árg. 8/98, vælviðfarin, til sølu fyri 22.000 kr. Nýprisur 29.800.
Tlf. 452065

KAPPSÚKKLA TIL SØLU
Ein vælhildin og lítið brúkt kappsúkkla av merkinum Taarnby RX100 Olympic til sølu. Prisuppskot kr. 2.500,00.
Tlf. 314268
e-mail: Jenssin@usa.net

APRILIA MOTORCROSS
til sølu um høskandi boð fæst. Hevur koyrt 1200 km.
Tlf. 372223

JAWA 350
Jawa 350 bíliga til sølu. koyrt 3000 km. kann siggjast hjá Opel v/Oyggjarvegin.
Tlf.332764

TIL SØLU
Dreingjasúkkla 6-8 ár, til sølu.
Tlf. 447965

TIL SØLU
Peugeot skudari, Trekker Road, árg. aug. 98, koyrt 98 km. Nýprisur 19.000 kr. til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 315383 ella 283340

Teldur

TELDUBORÐ TIL SØLU
Eitt skerkt, lítið brúgt teldubord, er til sølu fyri einans 300 kr.
Ring 457784 ella 456321 eftir kl.16:00

TELDA TIL SØLU
Packard Bell XLE-1410, 3.2 GB, 16 Mb, 24x/56 modem, FM Radio, 15" skerm, stylus 400 printari. Er undir garanti frá 8/98.
Tlf. 314018 ella 281005

NINTENDO 64 TIL SØLU
3 mðr. gamal tog lítið brúkt Nintendo 64 við einum joystokki og 1 spæli til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 315828

HYGG HER...
Wharhammer Dark Omen playstation spæl í býti við eitt annað. Koda fylgir við. Ring um kvøldið
tlf. 421171

TIL PLAYSTATION
Final Fantasy VII fyri 400 kr., lítið brúkt. Victory boxing fyri 150 kr. Crime killer fyri 300 kr.
Marius, tlf. 457568

TIL SØLU
Telda við lasaraprintara 233 MHz MMX við 32 MB ram, 3,2 GB harðdisk, 15" skerm, 4 MB 3D skermkort, ljóðkort, hátalarar, joystik, CD Rom og ymisk forrit, bert 8.500,-
Tlf. 332637

PLAY-STATION SPÆL!
til sølu fyri 350 kr. Spælið eitur »V-Rally« og er um rally-bilar, er keypt á jólum '98, lítið brúkt.
Tlf. 319440

TIL SØLU
Sega Mega Drive II + 7 spøl til sølu. Ring aftaná skúlatið.
Tlf. 361057

TIL SØLU
Til playstation, Command 8 Conquer fyri 300 kr.
Tlf. 457568

TIL SØLU
Intel Pentium 133 MHZ við Canon Lasarprintara, Minitower kabinet, S3 grafikkort, Soundblaster 16 ljóðkort, 240 Watt Soundwave hátalara, 1,1 GB harddisk, 16 MB RAM, Creative 6x CD-ROM, Win 95 tastatur. Programmir: M.a. Win 95, Microsoft Office 97, Corel Draw. Prisur einans 4.990 kr.
Tlf. 215656 ella 444341

TIL SØLU
Telda p166mmx 32mb ram 2,1gb hd voodoo2 12 mb 3d kort soundblaster ljóðkort 15"skerm 56.000 bps modem 24xcd rom 4x w8xrcd brennara scannara, printara joystik, W 95, office 97 og nøkur spøl, nýtt tower fylgir eisini við til sølu fyri einans: 8500 kr. tlf: 281550.

Tónleikur

HYGG HER
2 stk. JAMO D265 (265 W) hátalarar til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 317023

SONY STEREOANLEGG
v/ dup. bandupptakara, radio, cd-spælara og fjarstýring, pent design, til sølu fyri 2300 kr. Standari til hátalararnar fylgir við.
Tlf. 315047

TIL SØLU
Yamaha RY8 trummubox við undirspæli, til sølu fyri 1200 kr.
Tlf. 421419

TIL SØLU
Yamaha Pacifica 303-12 12 str. el-guitari til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 421419

TIL SØLU
Eldri, vakurt Hornung & Møller klaver til sølu fyri hægsta boð yvir 10.000 kr.
Tlf. 317114

TROMPET
av merkinum Jupiter, er til sølu. Er 3 ára gomul og sera væl viðfarin.
Tlf. 315470

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Eitt sera lítið brúkt Samsung sjónvarp 28" og video Jet-Drive sv-35xk til sølu fyri hægstbjóðandi. Nærri fæst at vita á
tlf. 456204

PARABOL
Parabol, motordrivin, er 1,20 m. við kortlesara til sølu fyri 5200 kr.
Tlf. 312907

ELDRI LITSJÓNVARP
Philips 28" og møblar 3+1+1 av tær við pútum, bíliga til sølu.
Tlf. 310505 eftir kl. 18

Ymiskt

PAPPESKJUR TIL SØLU
Pappeskjur til sølu. 3 støddir

hædd	breidd	longd
31,5	24,7	37,0
13,0	21,0	41,0
20,5	26,5	49,5

Tlf. 31 31 33

YNSKIST TIL KEYPS
Husmor vindeyga 80x120 ynskist til keyps ella í býti við eitt 60x100.
Tlf. 312722

ROKKJALLARIN
Vit átaka okkum at selja fyri fólk.
Eisini keypa vit deyðsbúgv.

ROKKJALLARIN
Tlf. 311990 & 283390
Tinghúsvegur 42 · 100 Tórshavn
Opið: mánad.-friggjad. kl. 13–17.30
Leygardag: eftir avtalu

FOTOTÓL TIL SØLU
Obrúkt Minolta 300SI speglrefleks fototól við 35-70 mm linsu og innbygdum blitz til sølu.
Tlf. 314388

YNSKIST TIL KEYPS
Lítil parabolantenna og eitt høvd ynskist bíliga til keyps og ein dekodari.
Tlf. 361452

HEY TIT ØLL!
Burturluting verður í KFUK, Varðagøta 9, sunnudagin 25.4.99 kl. 16.30.
Heilsan Ungdómsskótarnir úr Havnar KFUK

TIL SØLU
Ein hábjálki 18x18 cm. 8 m. langur, til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 310232

TIL SØLU
Ein garasjuhurð við 4 elementum við rútum í og við automatikk. Mát: h. 2,50 b. 3,50. Bíliga til sølu.
Tlf. 314425

TIL SØLU
Fototól til sølu fyri 100 kr.
Tlf. 375015

RULLUSKOYTUR
Rulluskoytur: 1 sett, xp 500, stødd 42 til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 332518

TOMBOLA
Verkhúsið Stíggjur hevur tombola í FK Saltangará friggjadagin 23.04 frá umleið kl. 11.
Verkhúsið Stíggjur

ER TAÐ NAKAR
sum hevur eitt bíligt reiggjustativ at selja okkum? Um so er,
ring 315953

KOLKOMFÝRUR
ynskist til keyps. Hevur tú ein, so komið eg eftir honum.
Tlf. 311464, Johan

BRENNIOVNUR YNSKIST
Lítil brenniovnur ynskist til keyps.
Tlf. 311464, Johan

JØRÐ TIL SØLU
Matr. nr. 617 í Skopun verður seld til hægstbjóðandi.
Tlf. 311396 ella 286600

TIL SØLU
Innhurð v/ skaða og ein sovibrúk.
Tlf. 317583

TIL SØLU
Sera vokur fuglasamling til sølu. 34 fuglar og 4 glasskáp.
Tlf. 456215

YNSKIST
Innhurð 210x80 cm. úthurð 210x90 cm. báðar vinstra inn.
Tlf. 443078

HYLSTUR BURTURMIST
Eg havi mist eitt hylstur til eitt kasettuband av merkinum philips, helst á leiðini ímillum Runavík og Strendur. Í hylstrinum vóru tríggjar permur til bond, sum eg havi tikið upp
Berit
Tlf.: 44 89 44
Mán-hós kl. 8.30-15.30:
Annars: 44 73 75

Tú mást ikki bera falskan vitnisburð ímóti næsta tínum

Sum formaður fyri Elduvíkar kirkjuráð gevur Johan Hammer í Sosialinum tann 9. apríl ljóð fyri sínum privatu meiningum. Hetta er meira enn løgin hugsunarháttur, tygum her koma við. Og fyri at tygum ikki skulu doyggja í syndum tygara, fari eg at koma við nøkrum fáum viðmerkingum.

Í einum av sínum mongu bókum skrivar tann heimskendi vísundamaður og lækni Albert Schweitzer: »…uden at Sandheden tager skade«. Eg haldi, at tygum ikki bert eru komin at markinum, men er farin yvir um, so at **Sandheden tager skade.**

Yvirskriftin er henda løgna: »Mótmælisfólkini hava mist jørðforbindilsið«. Nei og aftur nei. Eg havi hvørki mist jørðforbindilsið ella forbindilsið við halgu bók. Men standa tygum aftanfyri tað, sum stendur í hesari grein, so hava tygum víst, at tygum hava mist forbindilsið við halgu bók. Tað er syndarligt, tá ein formaður í einum kirkjuráði, hevur gjørt hetta.

Greinin byrjar soleiðis: »Tey, ið hava sent mótmælisskrivið megu vera íørviti. Tey hava púra mist jørðforbindilsið…« Nei, eg haldi meg ikki vera íørviti; men hvussu er við tygum sjálvum, sum kann koma við so nógvum slutri og ljótum skuldsetingum??

Í brotinum: »Ið stríðir móti kristnu læruni«, skriva tygum: »Tað er fleiri ferðir komið fyri, at Olofson og aðrir prestar hava noktað skildum at giftast uppaftur. Somuleiðis er tað komið fyri, at prestur hevur noktað, at doypa børn hjá foreldrum, ið ikki eru gift«.

Hetta petti fellur í tveir partar. Tann seinri parturin er: »prestur hevur noktað at doypa børn«. Prestur her stendur í eintali, meðan børnini standa í fleirtali. Hvør er hesin prestur, og hvørji eru hesi børn. Hetta er ein sera grov skuldseting, og tygum, sum tosað um kristna siðalæru, hava skyldu, at koma út við hvør presturin er, og hvørji børnini eru. Tí annars synda tygum grovliga móti 8. boð:

Du má ikke sige falsk vidnesbyrd imod din næste.

Det er: Vi skal elske og frygte Gud, så at vi ikke lyver vor næste noget på, ikke forråder ham, bagtaler ham eller påfører ham ondt rygte…«

Hin parturin viðvíkir tí, ikki at vilja gifta fráskild. Ein maður, sum so ráðisligla letur skriva í Sosialinum, hann mátti vita, hvat halga bók sigur hesum viðvíkjandi. Men tað er ikki eftir Bíbliuni tygum ganga, men tygara privatu meiningum. Og tær eru væl eingin áhugaður at lurta eftir.

Hetta við hjúnarskilnaði er so nágreinliga skrivað um í halgu bók, at um so er, at tygum lesa nakað í henni, so vita tygum, hvat rætt er. Nú eg siti og hugsi um hetta mál, rennur mær í huga, hvat Kaj Munk sigur í lestrabók síni Ved Babylons Floder annan sunnudag eftir trinitatis:

Naar Hr. Hansen har levet sammen med Fru Hansen i 23 Aar, saa kommer pludselig den store Kærlighed. Og forlanger sig hensynsløst respekteret. Borte er de 23 Aar, borte er Hjemmet, er Børnene, er Selvrespekten, er Hensynet til Loftet for selve Herrens Alter. Altid findes der en Pjattepræst, der er rede til at gøre sin egen Helligdom til Grin ved af Hr. Hansen, saa ofte denne finder det formaalstjenligt, at være Aftager af Løfte om evig Troskab med en ny Partner foran den samme i Herres Alter. Og nu er Hr. Hansen kommen i Gang. Hvem ved, om ikke, hvis han har Raad til det, den store Kærlighed til den eneste kan indfinde sig en tredie og maaske en fjerde Gang. Og Præsten er der stadig og er medgørlig og tjenstvillig og gør Nar af baade Livet og Døden og Evigheden. Hvad har vi for Resten opfundet den borgerlige Ægteforening til, om ikke til slige Tilfælde?

Eisini skriva tygum: »Tað ber ikki til, at ávísir prestar skulu fáa serloyvi, at prædika eitt og aðrir annað«. Ja, men hetta er tað, ið tit sum meinigheitsráð geva ávísum persónum. So mikið vita tit, at kirkjan í 1900 ár helt fast um læruna, at kvinnan ikki skuldi verða prestur. Men so kom eitt gudleyst stýri í Danmark í 1947, og trýsti hetta inn á kirkjuna, ímóti stórari mótstøðu frá bispum og prestum. Men gakk, guðloysingarnir vunnu.

Olofsson stendur ikki einsamallur uppá tað gomlu læruna. Hann hevur fleiri viðhaldsmenn og fólk í fólkakirkjuni. Millum tær kirkjur, sum halda fast um gomlu læru, er tann rómversk-katólska og tann grisk-ortodoksa og fleiri aðrar. Nú er tað ein gomul: Kristenhetens trosbekjennelser og kirkesanfunn av Einar Molland. Hon er frá 1961, har stendur, at tann rómverska kirkjan hevur um 692 milliónir limir. Men, hetta er, sum sagt gomul tøl. Minnist meg rætt, so las eg um dagarnar, at í dag hevur hon um 800 milliónir limir, og tann grisk-ortodoksa hevur 135 milliónir, og so eru fleiri aðrar kirkjur og samkomur, sum hava somu hugsan, sum sóknarprestur tykkara.

Lestrabókina komi eg aftur til eina aðru ferð.

Í greinini skriva tygum: »…uttan iva fór hetta at skapa klovning í kirkjuni«. Nú veit eg ikki, hvat arbeiði tygum hava til dagligt. Men eftir hjálminum tygum bera á høvdinum, kundi tað líkt til, at tygum hava okkurt við grótarbeiði. Um so er, so munnu tygum, sum føroyingar flestir, kenna til at kíla grót sundur. Til hetta skal ein góður kíli, og so slúa dúgliga á hann. Og steinurin hann klovnar. Hetta sama, bara í meiri syndarligum høpi, er tað, sum tygum saman við meinigheitsráðnum norðuri í Elduvík gera. Haldi bara á og klovningur kemur í okkara aldargomlu kirkju.

Tygum enda brotið: »Stríðir móti kristnu læruni« »…beinleiðis stríða móti kristnu siðalæruni, ið byggir á náði og fyrigeving«. Hetta er beinleiðis ósatt. Tað er ikki sambært teirri kristnu siðalæruni, at skiljast frá konu ella manni sínum. Og hetta, at prestur hevur noktað at doypa børn, er beinleiðis lygn, inntil tygum bara prógvað, at so er. Heldur ikki byggir siðalæra okkara á náði og fyrigeving. Tygum loypa eitt sera týdningarmikið lið um, **umvendingina.** Uttan hana, so fær eingin fatur í náðini og fyrigevingini. Heldur ikki tygum við tí sinnalag, tygum hava víst.

Nú eri eg 76 ár, og havi eg lisið nakað, men meira rangsnúgvað enn hetta, sum tygum her skriva, haldi eg meg ikki hava lisið. Tygum bróka tvær ferðir orðið vamlisligt. Eg noyðist at siga, at hetta er - á tí kristna økinum - tað mest vamlisliga eg enn havi lisið.

Klaksvík, 14. apríl 1999
Henry Andreasen

Sosialurin
www.sosialurin.fo

GEVID BLÓÐ